## Bankapakki í Svøríki



Svenska stjórnin kunngjørdi í morgun, at hon hevði samtykt at rætta landsins bankum eina hjálpandi hond. Hetta er annar bankapakkin í Svøríki, síðani fíggjarkreppan tók seg upp. Samtyktin hjá stjórnini í Stockholm ber í sær, at tað almenna setir 50 milliardir svenskar krónur í bankakervið fyri at stimbra tí til at veita privatum og vinnufeløgum lán. Eins og í Danmark hevur svenska stjórnin samtykt at krevja lønarsteðg í bankaleiðslunum, og at bonusskipanir hjá leiðslunum verða settar úr gildi.

## Bretska húsavirðið rapar

Eydnast tað ikki bretsku stjórnini at útvega fólki betri møguleikar at læna pengar, er tað ikki óhugsandi, at húsa- og íbúðarprísurin í Bretlandi fer at fella heili 40 prosent, og tað kann trýsta allan búskapin í botn. Tað skrivar blaðið The Independent í dag og vísir til eina kanning, sum The Centre for Economic and Business Research (CEBR) hevur gjørt. Í kanningini sæst, at húsa- og íbúðarprísurin í Bretlandi fall 16 prosent í 2008, og at hann fer at fella 25 prosent í ár, um fólk ikki fáa betri møguleikasr at fáa bústaðarlán.

# reistir á Toftum



*Nógv vinnuvirksemi er við havnalagið á Toftum, og áðrenn langt um líður standa væntandi fýra vinnubygningar lidnir á nýggja vinnuøkinum hjá kommununi við Rætt*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

ætlanin hjá felagnum var alla tíðina, at seinni bygningurin, sum er beint norðanfyri hin fyrra, skuldi verða bilaverkstaður.

Nú eru teir so farnir at reisa tann bygningin eisini.

### KBH byggir

Um dagarnar er eisini ein annar nýggjur bygningur reistur á økinum við Rætt, beint innanfyri gamla Turkihúsið í Oyrunum. Tað er KBH, sum byggir henda bygningin.

KBH er ein byggifyritøka, sum hevur bygt fleiri sethús og stovnar kring um í økinum.

Nú minni er at gera hjá fleiri timburmeistarum, hevur felagið gjørt av at fáa henda bygningin upp.

Hetta tykist vera skilagott, nú virksemið í løtuni er minni, enn tað hevur verið, og tað er hugaligt at síggja, at fólk hava mót um, at fíggjarkreppan, sum hevur herjað um stóran part av heiminum, hugsandi hasar av aftur, áðrenn langt um líður.

### Eisini saltsøla

Ein fjórði bygningur, sum væntandi kemur upp á økinum við Rætt í næstum, verður MJ Saltsøla, sum hevur søkt Nes kommunu og hevur fingið økið til bygging.

Økið hjá Saltsøluni liggur vestanfyri bygningarnar hjá Sea Star og sambært borgarstjóranum í Nes kommunu, Símuni Johannesen, hevur felagið havt ætlanir um at sett spakan í til várs.

- Nú er ein tíð, síðan partarnir tosaðu saman, men vit hava skilt, at ætlanin var at fara í gongd til várs. Økið vestanfyri bygningarnar hjá Sea Star er nóg stórt til bygningin hjá Saltsøluni, sigur Símun Johannesen, borgarstjóri.



*Hetta er bygningurin hjá KBH, sum er byggifelag, ið seinastu árini hevur bygt bæði sethús og stovnar kring um í økinum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Rókur og Lerkur fullir undir lúkurnar

**Í januar mánaði í ár hevur Landingarmiðstøðin í Saltangará landað 3.100 tons av ráfiski**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í morgun liggja Rókur og Lerkur í Saltangará og landa. Skipini hava stívliga 340.000 pund tilsamans, og soleiðis eru tey fullfermd við upsa.

Í gjár landaðu Polarhav og Stjørnan eisini í Saltangará. Teir høvdu umleið 400.000 pund, sum eisini er ein góður túrur.

Partrolararnir hava góðan upsafiskiskap, og væntandi er, at Heykur og Falkur koma inn at landa í vikuni.

Á Landingarmiðstøðini í Saltangará siga tey, at Bakur og Stelkur, sum eisini eru til fiskiskap, helst koma inn fyrst í næstu viku.

- Tað er ikki heilt óhugsandi, at skipini koma inn í endanum av hesi vikuni, men tá skal tað ganga ógvuliga væl at fiska, siga tey í Saltangará.

Í januar vórðu tilsamans 3.100 tons løgd upp á Landingarmiðstøðini í Saltangará, og hetta eru helst eini 1000 tons meira enn í januar í 2008.




*Rókur og Lerkur landa í morgun. Skipini eru full undir lúkurnar. Vit tóku hesa myndina á Betabryggjuni í morgun*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*